## Nógvar umsóknir

Nú fleiri túsund íslendingar eru arbeiðsleysir, fáa íslendskir arbeiðsgevarar sum vera man sera nógvar umsóknir, tá teir lýsa eftir fólki. Soleiðis var eisini, tá flogfelagið Iceland Express herfyri lýsti eftir 50 flogternum og -tænarum. Blaðið Vísir skrivar, at áhugin fyri størvunum vísti seg at vera so stórur, at Iceland Express gjørdi av at útseta umsóknarfreistina til í morgin. Í gjár hevði felagið fingið ikki færri enn knappar 1.200 umsóknir. Iceland Express hevur gjørt av at økja flúgvingina og fær tí brúk fyri fleiri starvsfólkum.



## Neyðlendi á ísinum

Eitt amerikanskt privatflogfar noyddist fríggjadagin at neyðlenda á innlandsísinum í Grønlandi. Flogfarið var á veg úr Íslandi til Narsarsuaq, men vánaligt veður noyddi flogskiparan at halda fram til Kangerlussuaq. Tað vísti seg kortini, at flogfarið hevði ikki nóg mikið av brennievni til ta longdu ferðina, og flogskiparin hevði ikki annað í at velja enn at seta flogfarið á ísin 60 fjórðingar frá Kangerlussuaq. Jan Eliassen hjá loftferðslumyndugleikunum sigur við KNR, at flogfarið fór illa undir neyðlendingini, men at flogskiparin fekk bara smávegis snuddir.

# ri valdømum






### TAÐ HALDA TINGFÓLKINI

| Navn | Flokkur | Fleiri valdømi í dag | Fleiri valdømi 2007 |
|---|---|---|---|
| Anfinn Kallsberg | Fólkaflokkurin | Ja | Ja |
| Poul Michelsen | Fólkaflokkurin | Nei | Nei |
| Jógvan á Lakjuni | Fólkaflokkurin | Ja | Landsstýrismaður |
| Jákup Mikkelsen | Fólkaflokkurin | Ja | Ikki á Løgtingi |
| Óli Breckmann | Fólkaflokkurin | Ja | Nei |
| Heðin Zachariasen | Fólkaflokkurin | Ja | Nei |
| Bjarni Djurholm | Fólkaflokkurin | Ja | Landsstýrismaður |
| Gerhard Lognberg | Javnaðarflokkurin | Ja | Ja |
| John Johannesen | Javnaðarflokkurin | Nei | Nei |
| Katrin Dahl Jakobsen | Javnaðarflokkurin | Nei | Ikki á Løgtingi |
| Eyðgunn Samuelsen | Javnaðarflokkurin | Ja | Ikki á Løgtingi |
| Mikkjal Sørensen | Javnaðarflokkurin | Ja | Ikki á Løgtingi |
| Hans Pauli Strøm | Javnaðarflokkurin | Nei | Landsstýrismaður |
| Bill Justinussen | Miðflokkurin | Ja | Nei |
| Jenis av Rana | Miðflokkurin | Nei | Nei |
| Karsten Hansen | Miðflokkurin | Nei | Nei |
| Alfred Olsen | Sambandsflokkurin | Ja | Ja |
| Edmund Joensen | Sambandsflokkurin | Nei | Nei |
| Bjørn Kalsø | Sambandsflokkurin | Ja | Landsstýrismaður |
| Magni Laksáfoss | Sambandsflokkurin | Nei | Landsstýrismaður |
| Marjus Dam | Sambandsflokkurin | Ja | Ja |
| Helgi Abrahamsen | Sambandsflokkurin | Nei | Ikki á Løgtingi |
| Jaspur Vang | Sambandsflokkurin | Ja | Ikki á Løgtingi |
| Kári P. Højgaard | Sjálvstýrisflokkurin | Nei | Nei |
| Kári á Rógvi | Sjálvstýrisflokkurin | Vil ikki svara | Ikki á Løgtingi |
| Annita á Fríðriksmørk | Tjóðveldi | Nei | Nei |
| Hergeir Nielsen | Tjóðveldi | Ja | Ja |
| Bergtóra H. Joensen | Tjóðveldi | Nei | Ikki á Løgtingi |
| Heini O. Heinesen | Tjóðveldi | Ja | Ikki á Løgtingi |
| Sjúrður Skaale | Tjóðveldi | Nei | Ikki á Løgtingi |
| Bjørt Samuelsen | Tjóðveldi | Nei | Ikki á Løgtingi |
| Tórbjørn Jacobsen | Tjóðveldi | Ja | Nei |
| Høgni Hoydal | Tjóðveldi | Nei | Nei |

Tó kann við vissu staðfestast at tað gongur skjótt hvønn vegin í politikki, tí hóast tingið við 19 atkvøðum fyri og 13 ímóti 25. oktobur í 2007 samtykti, at nú skuldi Føroyar vera eitt valdømi, So er veruleikin øðrvísi í dag, tí skuldi verið trýst á knøttarnar í dag, so sigur ein meiriluti av tinginum seg taka undir við at fara aftur til fleiri valdømi.

### Hugsanin í gomlu valdømunum

Á hesi mynd verður greitt frá, hvussu støðan er til fleiri valdømi á Føroya Løgtingi í dag býtt út á gomlu valdømini.

Hesi vilja hava fleiri valdømi

Hesi vilja hava eitt valdømi